gult cyan magenta svart

VI‹MERKING

Jógvan vi› Keldu, borgarstjóri:

Tú kanst vera stoltur av teimum

Solei›is fullu or›ini frá næstformanninum í Rey›u Stjørnu, me›an vit sótu á ásko›araplássunum til dystin millum Rey›u Stjørnu og KÍ í Beograd

Hetta er ikki fyrsta fer›in hjá mær vi› KÍ í útlondum, men helst tann mest forkunnuga og áhugaverda. Ta var tí ein serstakur forrættur at ver›a bo›in vi› eina tílíka fer›, har eg eisini hev›i høvi› at hitta b‡rá›spolitikarar í Beograd.

At vera objektivur og samstundis vera vi›haldsma›ur hjá einum li›i, er ikki altí› so lætt. Hetta kemur eisini av og á til sjónd›ar hjá ítróttarskrivarum í okkara lítla landi.

Tí tosa›i eg vi› bæ›i lei›arar hjá Rey›u Stjørnu og onnur fólk, i› høvdu veri› í Føroyum og sæ› fyrra dystin, fyri at fáa teirra meting av dystinum og av føroyska li›inum, sammett vi› tann í Føroyum.

Ta› kendist beinanvegin á›renn dystin, me›an vit gingu úti á vøllinum ein tíma á›renn dystarbyrjan, at spælararnir kendu seg meira fríar hóast heldur ørkymla›ar. So rokna› var› vi› einum ø›rum dysti enn dystinum í Føroym.

Ein álvarsamur Sivic

Men fyrr á degnum hev›i okkara venjari Tomislav Sivic ein sera álvarsaman fund vi› spælararnar, tí sjálvandi vildi hann ikki standa vi› einum stórtapi í sínum egna heimlandi.

Me›an vit gingu á vøllinum og hugdu upp at teim tómu sessunum, har pláss er fyri einum 65.000 sitandi ásko›arum, komu ikki færri enn 200 løgreglumenn úr ymisku inngongdunum, gingu ni›ureftir ásko›araplássunum, og gjøgnumgingu hvør sítt ra›, um so skuldi veri›, at eitt hvørt, kanska ein bumba, lá á ásko›araplássunum.

Naka› inni í dystinum eftir nógvan sang, sást ávísur ru›uleiki á ásko›araplássunum, tó uttan at løgreglan fór upp í.

Dagin eftir dystin, tá eg var› fluttur út til flogvøllin, fekk eg at vita, at ta› tey sungu var – hann seg›i ta› á enskum – »Let us live, kill Milosevic«. – Eg má siga, at eg kendi meg bilsnan, at ta› bar til.

Tá dysturin byrja›i, spurdi eg tveir av lei›arunum í Rey›u Stjørnu um hvussu stór ásko›arafjøldin var, søgdu teir umlei› 15.000 ásko›arar. – Ta› kendist eisini, at tey vóru í gó›um h‡ri, sungu, brestu í lógvarnar og trampa›u. Ta› kendist bæ›i hugaligt, men eisini kom ein ávísur fjáltur á teg.

Rangstaddur – dómarin eirindaleysur

Eftir bert fimm minuttum kendist, at teir ætla›u at vinna stórt og bert lítla løtu eftir komu teir í álop, har var naka› av trunkaspæli, ein er leysur saman vi› Zoltan málmanninum men var feldur. – Brotsspark.

Vit hildu, at hesin var rangstaddur. Ta› mettu vi›haldsfólkini hjá mótstø›uli›inum, sum vit sótu í millum, eisini. Onkur av teimum helt hálvannan til tveir metrar.

Brotsspark› sat, sum vera man í málinum. 1-0. – Lagi› var ótrúligt á ásko›arunum.

Í 16. minutti var aftur bo› eftir KÍ. Eitt væl fígjøgnum spælt mál.

Sjálvandi var stórur munur á li›unum, og hetta gav seg serliga til kennar, tá KÍ var í álopi, tá sást, at professionalisman kom teimum til gó›ar fram um amatørarnar KÍ.

Onkur helt hetta fara at ver›a eitt ræ›uligt úrslit, men eg helt fyri, at ta› var kanska hetta, sum skuldi til, tí nú fara teir kanska at kenna seg meira róligar, fríar og áleypandi. – So var.

Eitt vældiciplinera› KÍ

Okkara menn høvdu eitt ótrúligt disciplin í verjuni, Zoltan, Jan Andreassen og ikki minst Ovi Nysted og Kristian á Lakjuni, sum høvdu ein fínan dag. – Einasti ma›ur frammi var Rógvi, me›an He›in á Lakjuni, Arnold Joensen og Harley Bertholdsen trektu fram vi›.

Eg hugsa›i, at leikararnir og venjari hjá Rey›u Stjørnu hildu, at tá teir høvdu vunni› 2-0 og samanlagt 5-0, at teir ikki løgdu í anna› enn bara at fáa dystin lidnan.

Í hálvleikinum tosa›i eg tí vi› fleiri av fólkunum hjá Rey›u Stjørnu, eisini teir, sum eisini høvdu sæ› dystin í Føroyum og spurdi, um teir nú bara tóku sær av løttum. Nei, seg›i hesin eini, »tú skalt vera vísur í, at eitt li› sum Rey›a Stjørnan, i› júst er komin vi› aftur í kappingina, fer ikki at taka sær av løttum. Teir vilja vinna og vinna stórt á einum amatørli›i sum KÍ«.

Ein annar av lei›araunum, i› veri› hev›i í Føroyum helt fyri vi› meg bæ›i í hálvleikinum og eftir dystarlok, »Mr. Mayor, that was another game, your team played excelent. You can be proud of your team.«

Ber til, um viljin er til sta›ar

Ta einu løtuna – einar 20 minuttir – kundi ta› enntá tykjast, sum um KÍ hev›i yvirvág í spælinum vi› fleiri álopum, sum tó høvdu ov lítlan brodd í evstu løtu, og ta› kendist eisini á ásko›arafjøldini, sum var sera ónøgd vi› spæli›.

Jan Joensen, Marek og Niclas Niclasen dysta›ust av og á á jøvnum føti vi› mótstø›uli›i›.

He›in á Lakjuni var seint í seinna hálvleiki skiftur út vi› Hjalgrím Elltør, sum eisini hev›i nakrar møguleikar. Screko kom inn fyri Arnhold (ta útskiftingina skilti eg bert solei›is, at hann skuldi sleppa at spæla á heimlandsjør›), og Allan Joensen kom inn sum ein sannur strí›sma›ur.

Ta› var ikki sørt, at eg bretti mær á, tá dysturin var lokin.

Dysturin var ein sonn uppliving, og lat meg leggja afturat, at um ikki KÍ vinnur dystirnar, i› eftir eru í Føroyameistarakappingini, er ta› tí, at teir ikki spæla, sum teir spældu í Jugoslavia.

Ólavsøkan í Keypmannahavn

Eins og undan farnu ár ver›ur aftur í ár skipa› fyri eini pinku-ólavsøku í Keypmannahavn. Her plagast føroyingar á fer› og føroyingar, sum búgva ni›ri, at hittast til hugnaløtu, fáa ein bita, fara upp á gólv og anna›. Rættiliga fitt av fólki plagar at støkka inn seinnapartarnar og um kvøldi›.

Kaffistovan, sum letur uppaftur eftir 24. juli er dagliga opin kl. 16-19 og frá september ver›ur opi› frá kl. 14-19. Tó er javnan longri opi›, tí tiltøk eru í húsinum.

Ólavsøkuaftan fríggjadagin 28. juli:

Kl. 12.00 Kaffistovan letur upp, vi› matsølu og tónleiki

kl. 14.30 Fernisering. Torhild Tolfsen hevur frams‡ning vi› oljumálningum. Hon er ætta› úr Vestmanna. Mó›ir lista- og tónlistamannin Ova.

Kl. 15 Føroyar kristnar í 1000 ár. Í hesum sambandi ver›ur víst ein myndarø› vi› uml. 30 vatnlitsmyndum av føroyskum kirkjum, sum arkitekturin Holger Jensen hevur tekna›. Holger hevur eisini tekna› n‡ggju kirkjuna í Fuglafir›i. Skt. Ólavs Kirkjuli› eigur myndirnar.

Kl. 16 Kappró›urin á ólavsøkuni í Havn ver›ur útvarpa›ur

Kl. 18 Ólavsøkurø›an. Ina Friisdahl, lei›ari á Sjúklingahotellinum Tórshavn heldur rø›una. Ina var› sett í starv í okt. 99, og n‡ggja sjúklingahotelli› lat upp 22. januar. Ina er sjúkrasystir. Hevur á›ur arbeitt í Gentofte Kommunu.

Axel Eysturstein og Alex Bærendsen spælir tónleik til felagssangin

Kl. 19 Umframt smurt brey› fæst eisini heitur døgver›amatur kl. 19 -21

Kl. 21 Kafékvøld saman vi› Axel Eysturstein Alex Bærendsen syngja og spæla sangir kl. 21- 23

Kl. 23 Dansur kl. 23- 02. FUSE spælir/Kristina Heldarskar› og Axel Eysturstein. Atgongumerki 50 kr.

Ólavsøkudag leygardagin 29. juli

Kl. 12.00 Kaffistovan letur upp, matsøla og tónleikur

Kl. 14-16 Ólavsøkutilbo› til børn, matsøla, tónleikur og spæl

Kl. 17 Ólavsøkugudstænasta og 1000 ára kristnihald í Eliaskirkjuni. Føroyska kirkjan hevur um hetta mundi› 1000 ár á baki. Nógv hevur veri› gjørt burtur úr hesum 1000 ára kristnihaldi heima og tátturin ver›ur tikin uppaftur hendan dagin hjá okkum. Bergur Jacobsen prestur prædikar og eisini ver›ur solosangur.

Kl. 18- 21 Matsøla, ymsur smurdur og flógvur matur.

Kl. 21-22 Dansitónleikur, Jóhan Danielsen spælir

Kl. 22-23 Felagssangur, okkara midnáttarrø›a og føroyskur dansur

Kl. 23-03 Dansitónleikur. Jóhan Danielsen spælir. Eis ini ver›ur høvi at fara upp á gólv. Atgongumerki 50 kr.

Mundi enda› í N‡ Sælandi



Hans Holm hevur havt seinasta starvsdag, eftir at hava undrvíst í 39 ár. – Eg dugi kongarekkjuna og enntá árstølini, men Gu› viti hvat eg skal bróka ta› til, sigur Hans Holm

Mynd: Jens Kr. Vang

Hans Holm er kendur fró›arma›ur og mangar tímar eigur hann í útvarpsstovuni, har hann hevur greitt lurtarum frá um ymisk vi›urskifti á ey›kendari su›uroyardialekt. Hans Holm hevur veri› lærari á Føroya Læraraskúla og í Hoydølum, men hann hevur nú havt sín seinasta starvsdag á Føroya Læraraskúla. Vit hava hitt Hans til eitt ólavsøkuprát, um lestrarár, og um at koma aftur til Føroya eftir loknan lestur. Hans kom ikki heim, men til Havnar, sum hesin heimkæri tvørárma›ur sjálvur leggur dent á. Tó eru ta› ikki nógv sum vita, at Hans Holm eins væl kundi lagt lívslei› sína í N‡ Sælandi

DAGFINN OLSEN
MYND: JENS K. VANG

Hans Holm er í Føroyum kendur sum fró›arma›ur, i› eisini fegin sigur frá og gevur ø›rum lut í síni vitan. Hann hevur eisini undirvíst alt sítt yrkisskei›, ta› vil siga í 39 ár.

Hans Holm er føddur 12/12 í 1936 á Sevm‡ri á Tvøroyri. Barna- og ungdómsárini runnu á Tvøroyri. Har gekk hann í skúla og í 1952 tók Hans preliminerprógv.

– Sí›ani fór eg ni›ur til Danmarkar at taka studentsprógv. Tá í tí›ini var ta› so, at skuldi ein hava studentsprógv, og ikki hev›i múgvandi foreldur, so hev›i ein ikki rá› at fara til Havnar at ganga í skúla, tí eingin formur fyri stu›uli var. Eg fór tí ni›ur á Rungsted Statskole. Tvørámenn og su›uroyingar hava tradition fyri at ganga har. Ta› var statsskúli og tí bleiv goldi› í mun til, hvat foreldrini forvunnu. Ta› var sjálvsagt fyrimunur, umframt at lønarlagi› í Føroyum var lægri, enn í Danmark. Eisini kundi ein fáa ymisk legat og eisini hálvt ella heilt frípláss. Eg fekk hálvt frípláss aftaná tvey ár, grei›ir Hans Holm frá.

– Skuldi ein ganga í skúla í Havn, so var eingin stu›ul, ein skuldi leiga kamar og gjalda bøkur, sigur Hans Holm.

– Me›an eg gekk ni›ri kom eisini tann skipan, at bøkur gjørdust ókeypis, minnist Hans, sum fór av landinum 15 ára gamal og til Danmarkar at ganga í studentaskúla.

– Tær almennu stu›ulsveitingarnar, sum vit kenna í dag undir heitinum SU, vóru ikki til tá. Ta› sum seinni gjørdist SU, var ta› sum tá nevndist UU, Ungdoms Uddannelsesfonden. Ta› var› sett á stovn ta› ári›, eg byrja›i á Universitetinum. Eg minnist, at ta› var uppá hálva a›ru milliónina í alt. Hetta kundi bert søkjast av fólki, i› tóku hægri bókliga útbúgving og sum høvdu víst seg at vera ta›, i› nevndist »studieegnet«, ta› vil siga, høvdu tiki› fyrsta part, sigur Hans Holm.

– Seinni bleiv skipanin galdandi fyri a›rar útbúgvingar eisini. Ta› vil siga, at ein hugbur›broyting fór fram. Nevniliga, at útbúgving var eitt slag av fløgu.

Hans fór bert 15 ára gamal av landinum, og heldur hann hetta vera ikki sørt áhugavert at hugsa um í dag. Vi›víkjandi stu›linum, ella vantandi stu›li, sigur Hans, at tvey ting vóru at dúva uppá. Stu›ul frá foreldrum, og ta› klára›u ikki øll foreldur, og so var ta› at arbei›a, umframt lesturin.

– Eg var so heppin at hava studentastarv, umframt lesturin, líka frá næsta árinum eg las. Ta› var trupult at fáa, men har var ta›, i› nevndist Studenternes Arbejdshenvisning, har ein kundi fáa smærri størv, t.d. at ganga vi› avísum. Eg var millum anna› bakarabo›, smálær Hans.

Ikki aftur til Føroya

Hans Holm minnist í samband vi› studentsútbúgvingina, at vanligt var ikki at taka hesa útbúgving tá. Av árganginum, sum saman vi› Hans tók preliminerprógv á Tvøroyri, fór bert Hans á studentaskúla. Ári› eftir fór eisini bert ein á studentaskúla.

– Ta› var jú eisini ta›, i› vert er at hugsa um, at fór ein sum eg av landinum at taka studentsprógv, so var ta› tí, at ein hev›i eina ætlan um, at ein hægri lestur skuldi gjøgnumførast. Ta› var so ein avger›, i› skuldi takast. Har vóru tvey ting í. Fyrst, at tú ætla›i tær at taka eina universitetsútbúgving. Samstundis var hetta ein avger› um, at tú ætla›i tær ikki aftur til Føroya, tí ta› var ótrúliga lítil eftirspurningur eftir fólki vi› slíkari útbúgving. Onkur lækni, onkur sakførari, onkur verkfrø›ingur og onkur prestur. At lesa náttúrsøgu og geografi, sum eg longu á ungum árum ætla›i, og koma aftur til Føroya, kundi ein róliga síggja burturfrá. Roknast kundi vi› einum starvi í øllum landinum, nevniliga á studentaskúlanum, sigur Hans Holm, sum annars upplivdi, at hesi vi›urskiftini broyttust í lestrartí›ini.

Hans arbeiddi undir lestrinum á Zoologisk Museum, har hann byrja›i vi› at skifta spritt á øllum skri›d‡runum í savninum.

– Hetta var heppi, tí starvi› var tímalønt. Har arbeiddi eg í nógv ár. Sí›ani hendi jú ta› frá umlei› 1960 og frameftir, undirvísingarverki› vaks sera nógv og tørvurin á lærarum var stórur. At fáa lærarastarv, um ein ikki var li›ugur at lesa, var eingin trupulleiki, so eg byrja›i at undirvísa á kvøldskei›i á millumskúla og studentaskei›i líka frá 1961, so ta› eru nú 39 ár sí›ani. At ein arbeiddi vi› sí›una av hev›i so sjálvsagt vi› sær, at lestrarárini gjørdust fleiri. Eg var 9 ár á veg, me›an ta› vanliga var sjey ár. Eg vil tó siga, at tey, sum tóku útbúgvingina uppá 7 ár, vóru skjót, sigur Hans Holm.

Hans fór beinlei›is at lesa ví›ari, eftir loki› studentsprógv.

– Alt anna› var at rokna sum spill av tí›, sigur Hans Holm.

Kolegiini ikki uppfunnin

Hans Holm las í Keypmannahavn, tí har var einasta sta›, i› útbúgvingin fanst. Tvey universitet vóru. Í Keypmannahavn og í Århus, men í Århus vóru ikki allar útbúgvingar.

– Kollegiir og slíkt vóru ikki. Nøkur av teimum gomlu vóru, sum t.d. Regensen. Ta› stóra kollegiibyggjarí› byrja›i mi›skei›is í fimmtiárunum. Hini stóru, sum t.d. Solbakken og Otto Mønsted og Kollegiegar›urin og onnur komu seinni, har kundu fleiri hundra› fólk búgva. Ta› merkir, at yvirhøvur máttu fólk leiga sær kamar hjá privatum og ta› kundi vera rættiliga áhugavert, sigur Hans Holm.

– Hetta, sum í dag er vanligt, vi› í hvussu er at hava

At sleppa at vaska klæ›ir sjálvur, var ógjørligt. Ein kundi hægst vaska einar hosur í einum vaski.

atgongd til ba›irúm, køk.., nei, nei, nei! At sleppa at vaska klæ›ir sjálvur, var ógjørligt. Ein kundi hægst vaska einar hosur í einum vaski, minnist Hans Holm.

Bla›ma›urin, i› á›ur hevur hoyrt Hans grei›a frá, roynir at fiska eftir ymsum smásøgum frá lestrarárunum.

– Eg kom til alt held inn á Regensen í 1958. Ta› var eitt stórt legat at fáa. Tá í tí›ini rokna›i ein vi›, at ein einsamallur studentur – studentar vóru oftast einsamallir – brúkti 7.600 krónur árliga. Rokna› var› so vi›, at ein studentur kundi fáa upp til 6.500 krónur. Tær frestandi 1100 krónurnar kundu fólk so sjálvi fáa til vega í summarfrítí›ini til dømis, sigur Hansa Holm.

Vígslupappír og íbú›

– Fyri at fáa íbú› í Keypmannahavn, skuldi ein hava vígslupappír. Mong giftust sjálvsagt júst tá, ikki tí, eg ivist ikki í, at fólk elska›u hvørt anna›, sigur Hans, og vissar sær, at bla›ma›urin ikki fær ta› at ljó›a sum um, at Hans bert giftist vi› sínari Sólrun, bert fyri at fáa eina íbú›.

– Vit fluttu inn í eina íbú› í Kronprinsessegade, framleiga›u hana frá einum av mínum vinmonnum frá Regensen. Hetta vi› at hava heitt vatn og sentralhita. Nei, go´morin – so var ikki! Vit høvdu ein ovn, ein Caldo brennara. Ein koyrdi petrolium í og so brann ta›. Men WC var í íbú›ini og ta› var sanniliga ikki vanligt! Vanliga var felags WC á gongini, men vit høvdu ta› inni, men ta› var so sera lítið. Eg fór ofta inn á Regensen og undir eina av brúsunum har, tí tær vóru úti á gongini, grei›ir Hans frá.

– Vit høvdu eisini eitt ísskáp. Ta› var ein trækassi. So fór ein til ísmannin og fekk »en kvart is«. Hetta leg›i ein so í skápi› og ta› helt í eina hálva viku. Tá vit seinni fluttu út á Solbakken, so fingu vit eitt kuldaskáp. Pápi hennara var jú innanfyri hasa vinnuna. (Leif Mohr, bl›m). Ta› var av merkinum Bosch. Ta› vóru umlei› 140 íbú›ir har tá, og hetta var heilt sikkurt einasta kuldaskáp, i› var har tá. Eg kann nevna, at summari› '63 fóru vit til Føroya. Eini føroysk studentahjún, i› eisini bú›u har, lærdu so kuldaskápi›. Vit bóru ta› yvir til teirra. Hugsar ein so um, hvat í dag er standard útger› allasta›ni, so er stórur munur á, huglei›ir Hans Holm.

Mundi enda› í N‡ Sælandi

Hans Holm ætlar at fer›ast, nú hann hevur lagt lærarastarvi frá sær. Millum anna› vil hann fegin til N‡ Sælands.

– Ja, ta› er jú ein stuttlig søga. Eg mundi enda› í New Zelandi í mínum ungu døgum. Ta› hendi ta›, tá eg var 19 ára gamal og júst var byrja›ur á universitetinum, at tá útbjó›a›i New Zealandski staturin eitt legat til ein nor›urlendskan lesandi í náttúrusøgu. Teir rinda›u fyri alt. Ein skuldi bert binda seg til at starvast har tvey ár eftir lokna› útbúgving. Baktankin var sjálvsagt, at tá ein hev›i veri› har alla útbúgvingartí›ina, so var ein blivin meira og minni vanligur new zealandari. Har var stórur tørvur á biologum. At fara til New Zealands var naka› anna› tá, enn nú. Tjaldri› sigldi 14. hvønn dag millum Keypmannahavn og Havnina og fer›in tók tveir dagar. Tá var sjálvsagt langt at fara til New Zealands, men sum umstø›urnar vóru vi›víkjandi stu›uli og slíkum, so helt eg vera vert at royna. Men foreldrini søgdu bums nei og eg fekk at vita, at tey heldur skuldu taka lán í húsunum, enn at eg skuldi fara. Seinni fekk eg at vita, at eingin søkti. Ta› vil siga, at hev›i eg søkt, so hev›i eg fingi› ta›. So í dag vil eg sera fegin vita, hvat ta› var, i› eg gekk glipp av, tí eg havi ongantí› neri› har, grei›ir Hans Holm frá.